

## Brown er sum Hitler

Enski forsætismálaráðharrin er sum ein órógvandi spegilsmynd av Der Führer, slær ein listamaður fast. – Líkheitin er sláandi. báðir byrjaðu sum ráðharrar, teir nýttu snildi at sleppa upp á toppin og báðir tóku valdið uttan eitt demokratiskt val, skrivar listamaðurin Louis Sidoli sambært The Daily Telegraph á sínari websíðu. – Báðir eru illa lýddir fyri síni illsinnisherindi, og báðir hava elvt landi sínum stóran skaða, heldur Sidoli fram. Hørðu orðini koma frá enska listamanninum Louis Sidoli, sum hevur smeltað eina mynd av Adolf Hitler, nevnd »Reign of Terror« saman við eini mynd av Gordon Brown við heitinum »Reign of Error«. Á heimasíðu síni nevnir Sidoli seg sjálvan sum »Størsta núlivandi bretska glaslistarmann«, og hann sigur við The Daily Telegraph, at hansara umstrídda listarverk hevur íblástur frá teirri list, sum blomstraði undir forsetadystinum hjá Barrack Obama í USA.

# Neyðugt er við nýbroti

**- Vit eiga at seta eina ávísa landingarskyldu á pelagiska tilfeingið. Hetta kann gerast í stigum. Eg ivist onga løtu í, at tá hetta er gjørt, verður samstundis grundarlag skapt fyri einum nútímans pelagiskum virki, sum vinnan kann standa saman um. Hetta kemur at geva Føroyum ein nógv størri lut í hesum tilfeingi, samstundis sum avskurðurin frá framleiðsluni kann ganga inn í framleiðsluna hjá Havsbrún, ið aftur er grundarlagið undir eini vælvirkandi føroyskari alivinnu, sigur Eyðfinnur Jacobsen, fyrrverandi skipari**



TILFEINGI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*myndir: Vilmund Jacobsen*

Herfyri var nógv frammi um pelagisku fiskasløguni, sum føroyingar veiða, men sum fyri ein stóran part enda í útlendskum havnum. Tað hevur verið og er framvegis ein stórur trupulleiki, at føroyingar ikki virka hesi fiskasløg til matna uppi á landi. Hetta ger, at skipini, sum landa ein stóran part av hesum tilfeingi til matna, ikki hava ein landingarmøguleika í Føroyum, sum er kappingarførur við keyparar uttanlands.

### Eingin framleiðsla

Tað eru longu fleiri ár, síðan pelagiska virkið í Kollafirði varð bygt, og her hevur í nøkrum umførum verið roynt at virka pelagisk fiskasløg til matna. Í endanum av 2009 varð ein nýggj roynd gjørd at lata upp fyri hesum møguleika í Kollafirði í einum samstarvi millum JFK-Trol í Klaksvík og eitt stórt hálendskt felag, sum hevur nógv virksemi á pelagiska økinum.

Men heldur ikki hendan royndin sær í nóg stóran mun út til at kunna draga føroysk og útlendsk skip til lands í Føroyum.

Á virkinum í Kollafirði, sum nú kallast Faroe Pelagic, eru maskinur til flakaskering, men tá virkið læt upp, søgdu partarnir, at talan í fyrsta lagi verður um at heilfrysta fisk til matna.

Spurningurin er so, um hetta í longdini verður nóg mikið til tess at fáa ein nógv størri part av pelagiska tilfeinginum upp á land í Føroyum.

Síðan Faroe Pelagic tók ímóti fyrstu lastini hjá Fagrabergi í endanum av 2009, hava vit ikki sæð, at føroysku skipini javnan hava ligið á Kollafirði. Heldur hava vit hoyrt í fjølmiðlunum, at tey hava landað í eitt nú Íslandi, Noregi og serliga í Danmark.

Vit kunnu fegnast um royndina, sum nú verður gjørd í Kollafirði, men longu nú er líkt til, at tað skal meiri til enn heilfrysting til matna.

Á hinari síðuni hava vit Havsbrún í Fuglafirði, sum er veitari av fóðuri til eina vælvirkandi føroyska alivinnu. Eins væl og fá skip síggjast við bryggjuna í Kollafirði, er tað vorðið meiri sjáldsamt, at føroysk skip landa til ídnað í Fuglafirði. Higartil í ár eru tað serliga tvey systirskip úr Írlandi og nakrir norskir bátar, sum hava lyft undir rávørugrundarlagið hjá virkinum í Fuglafirði.



*Eyðfinnur Jacobsen er sannførdur um, at Føroyar sum tjóð eiga at ansa betri eftir, hvar tilfeingið, sum svimur í havinum, endar – og at hetta ikki bara fer av landinum óvirkað ella kanska fer heilfryst til aðrar at meirvirka og tjenar pengar upp á*

### Fóður til aling

Ein av teimum, sum sjálvur hevur fiskað nógv við kraftblokki og hevur verið upptikin av pelagiska tilfeinginum, sum ikki kemur til sættis í Føroyum, er Eyðfinnur Jacobsen í Fuglafirði.

Hann byrjaði á kraftblokkaveiði undir Føroyum í 1970 og hevur eisini fiskað við donskum og eitt skifti við enskum skipum. Eftir at hann gavst í pelagisku vinnuni í 1989, var hann eitt skifti stýrimaður og síðan í fleiri ár skipari við Munki, sum Beta átti.

Eyðfinnur, sum fylgir væl við, tá ræður um vinnu, setir spurnartekin við, hvussu leingi tað yvirhøvur verður loyvt aftrat at fiska eitt nú makrel, sild og svartkjaft til mjøl og fóður.

- Vit kunnu hugsa okkum, at skip áðrenn langt um líður ikki sleppa at fiska hesi fiskasløg til ídnað, og hvussu verður tá við grundarlagnum undir okkara fóðurframleiðslu, sum aftur er grundarlagið undir okkara aling, ið stendur fyri einum munandi parti av okkara útflutningsvirði?, spyr hann.

Fyrrverandi skiparin vísir á, at eitt er fóðurvirkið í Fuglafirði, sum seinnu árini hevur fingið munandi minni av rávøru. Annað og nógv meiri álvarsamt er, at alivinnan, sum gevur góð íkast til landsbúskapin og hevur hópin av fólki í starvi, bæði beinleiðis og í avleiddum vinnum, hevur brúk fyri dygdargóðum fóðuri í sínum alivirksemi.

- Fóðurið hjá Havsbrún er víðakent fyri sínar dygdir, har nógv tann størsti úrdrátturin er fiskur, samstundis sum aðrir framleiðarar eitt nú brúka ymiska grøði sum uppíblanding. Hvaðani okkara alivinna skal fáa sítt dygdargóða fóður, tá eingin pelagiskur fiskur verður landaður til ídnað meiri, er ein spurningur, sum fólk seta sær.

Eyðfinnur væntar ikki, at tað verða íslendingar ella norðmenn, sum tá koma okkum til hjálpar, ei heldur aðrir.

### Ansa betri eftir

- Vit kunnu hugsa okkum, at tá pelagisku fiskasløgini ikki longur kunnu landast til ídnað, verður samstundis dýrari at keypa teir úrdráttir, sum tá skulu brúkast til fóðurframleiðsluna. Tað er